Lag til rættis: Rólant Waag Dam

# Til børn og barnsligar sálir


Børn og barnsligar sálir ferðaðust runt í bygdini leygardagin

**Tað kundi verið yvirskriftin á barnatiltakinum á G!, sum eins og undanfarin ár varð soleiðis skipað, at vaksin eins væl og børn kundu stuttleika sær**

Barnatiltakið hevði spæliplássið sum sítt útgangspunkt, men tað var skjótt, at børn og vaksin ferðaðust bygdina upp og niður.

Angela og Hannibal løgdu fyri og síðani tóku Dánjal á Neystabø og Búi Dam yvir, tá teir byrjaðu sína ævintýraferð. Við teirra eyðkenda sangi og livandi søgum, undirhildu teir yngri sum eldri, og hevur tú enn ikki hoyrt og sæð teir framført, so er at gera tað á ólavsøku, tá teir báðir aftur fara á ferð.

Eitt herligt konsept, sum bert verður betri av, at teir duga at endurnýggja seg sjálvar.

Eisini leikurin hjá Huðrum um prinsin, sum ikki tímdi at verða kongur, men heldur vildi vera prinsessa, dámdu børnunum væl. Hesi ferðaðust saman við leikarunum bygdina upp og niðurm, og endaðu niðri á sandinum, har tey funnu Prins Essa.

Stuttligt at síggja, hvussu gott tak hesir ungu leikararnir høvdu á børnunum.


Mynd: Beinta Haraldsen

# G!-streingjarenning uttan G!

**Onkur misti í øllum førum tað, hann hevði, ið skuldi dekka tað, ið ikki skuldi síggjast, tá fólk í túsundavís hugdu eftir G!-streingjarenning í Gøtu**

Tað var ikki sørt, at G!-festivalurin hevði nakað av Roskilde anda yvir sær leygarkvøldið, tá Mess skipaði fyri G!-streingjarenning á sandinum.

Sum skilst, høvdu fyrireikararnir helst sæð, at talan var um ordiliga nakinrenning, men hetta loyvir galdandi lóggáva í Føroyum ikki, og tískil gjørdist – ógvuliga hóskandi – talan um G!-streingjarenning.

Eftir áskoðaratalinum at døma, er hetta tiltak komið fyri at vera. Fólk í túsundavís stóðu eftir, tá Teitur var givin at spæla, fyri at síggja beru rumpurnar fara tuskandi framvið sjóvarmálanum.

Onkur var í boxershorts, teir allarflestu í g-strongi og ein einstakur hevði sett ein sokk á tað, ið skuldi fjalast, men hesin datt av, tá runnið varð. Eisini ein einstøk dama var í millum rennararnar, og sum eisini kvinnuligi luttakarin má hon metast at vera vinnarin í sínum bólki, hóast hon ongantíð setti fótin á sandin, men sat á rygginum á einum mannfólki, ið royndi at tuska tað, hann var mentur.


Sauna'in er eitt av bestu dømunum um, at á G!-festivalinum ber alt til

Mynd: Rólant Waag Dam

# Sauna, sól og summar

**Tað var veruleikin á sandinum í Syðrugøtu um vikuskiftið, har suðurlendskur stemningur við sól, summar og sauna settu sín serliga dám á strondina**



Hugskotið er tó finskt og tað eru fólkini handan hugskotið eisini. Hugskotið er eisini serstakliga originalt, tí eins óhugsandi tað í roynd og veru er at savna fólk í túsundavís á Gøtusandi, eins óhugsandi er tað, at ein sauna skuldi liggja har um vikuskifti, sum saman við syrutum sangi og serligum sálum, savnaði saman festivalgestir, sum meiri og minni spillnaknir sótu inni í hesum pumpandi heita tjaldi, meðan tey við jøvnum millumbili runnu oman í sjógvan og tóku sær ein líltan dukkert.

Men soleiðis sá veruleikin út á Gøtusandi hósdagin, fríggjadagin og leygardagin. Sauna'in er eitt av bestu dømunum um, at á G!-festivalinum ber alt til. At festivalurin savnar saman ung sum eldri, ger upp við allar fordómar hjá fólki og ger tað óhugsandi til veruleika.

Tí álvaratos, hvør hevði nakrantíð ímyndað sær, at ein sauna skuldi savna saman berar reyvar á sandinum í Syðrugøtu?

